# Eitt sindur um bundnaturriklæðini í bókini

**bundnaturriklæði**
*tíðindaskriv frá Føroyskum heimavirki*

Í fororðinum til 1. útgávu, ið kom út í 5.000 eintøkum í 1983 og nú er uppseld, stendur m.a.:

»Umframt mynstrini hjá Elsu eru til hesa bókina fingin til vega gomul bundnaturriklæðir úr øllum Føroyum. Eftir hesum eru mynstur gjørd, og dugandi kvinnur hava teknað, talt og bundið, og gjørt mynstur til bundnaturriklæðir í broyttum sniði. Elsa hevur lagt seinastu hond á øll mynstrini«.

Nú bókini verður prentað uppaftur í 5.000 eintøkum, heldur nevndin í Heimavirkinum, at rættast er at greiða frá, hvaðani mynstrini til tey gomlu turriklæðini stava. Hesi bundnaturriklæðir bera øll navnið á konuni, sum hevur bundið ella átt turriklæðið, sum uppskriftin er gjørd eftir.

Á síðu 11 stendur uppskriftin »Jóhanna Maria«. Hesa uppskrift hevur Jóhanna Maria Skylv Hansen givið Elsu Bærentsen í 1972. Jóhanna Maria kallar mynstrið »Mikinesbordin«. Hon hevur greitt frá, at Maria Hansen og Lisa Abrahamsen – báðar mikineskonur – hava uppfunnið hetta mynstrið í felag. Hetta hevur Lisa Mikkelsen, f. 26/12 1882, seinni búsitandi Uppi undir Varða í Havn, sagt Jóhonnnu Mariu. Maria Hansen greiðir annars soleiðis frá:

Dupult turriklæðir – fóðraði – vóru ikki vanlig, og tey vóru bara til gott. Oftast vóru tey tá myrkamorreyð. Men Ata Nolsøe (kona Ludvík á Lambamýru og dóttir Onnu av Ryggi í Miðvági, ið giftist til Nólsoyar) brúkti myrkamorreytt við holborda og reyðum fórði – heimalitað – og við frynsum.

Nógvar konur brúktu ljósamorreytt við einfaldum holborda og ongum frynsum. Summar brúktu litað brúnt. Gerandisturriklæðið hevði rondutan borda – oftast var tað nakað dimt grátt við svørtum rondum til borda. Mest varð tað brúkt krossað um bringuna, knýtt aftur um bak. Frynsar vóru bara brúktir til gott.

Bundnaturriklæðið var vanliga uttanyvirplaggið.

Á síðu 20 stendur uppskriftin »Sigga«. Sigga var ættað úr Syðrugøtu og giftist út á Strendur. Kirstin Henriksen, ættað av Strondum g.v. Jeffrei Henriksen, Tórshavn, lænti Heimavirkinum turriklæðið – hon hevur fingið tað frá Siggu – at gera mynstur eftir. Hetta bundnaturriklæðið hevur øðrvísi snið enn hini.

Á síðu 27 stendur uppskriftin »Maria«. Hetta mynstrið er gjørt eftir turriklæðnum hjá Mariu Hammer, Hovi. Maria brúkti bert hetta mynstrið til bundnaturriklæði. Hon var fødd 3/8 1903 og doyði 11/99 1996.

Á síðu 30 stendur uppskriftin »Anna Kristina«. Hetta mynstrið er gjørt eftir turriklæðnum hjá Onnu Kristinu Jaocbsen á Dunga í Syðrugøtu. Anna Kristina var ættað úr Grótinum á Skipanesi. Gøtu Fornminnisfelag hevur fingið turriklæðið til gávu. Anna Kristina var fødd í 1874 og d. í 1954.

Á síðu 38 stendur uppskriftin »Mathea«. Henda uppskrift er kallað eftir Matheu Skaale, Tórshavn, ættað av Trøllanesi. Katrina Østerø av Trøllanesi fekk bróðurdótrina Marjun Wolles á Eiði at gera mynstrið eftir minninum hjá sær. Katrina mintist gamla konu á Trøllanesi, Petronella, ættað av Viðareiði – gift við abba Matheu – binda hetta mynstrið í turriklæði til Matheu, tá hon var smágenta. Mathea er f. 9/8 1906. Henda gamla føroyska uppskrift hevði ikki verið varðveitt, um bindibókin »Bundnaturriklæðið« varð ikki givin út. Elsa Bærentsen hevur teknað mynstrið og skrivað uppskriftina, sum er tann truplasta at binda úr bókini.

Á síðu 52 stendur uppskriftin »Katrina«. Henda uppskrift er kallað eftir Katrinu á Trøllanesi, sum seldi Heimavirkinum bundnaturriklæðið úr handspunnum tógv í 1968. Turriklæðið hevur sama mynstrið sum »Mathea«, men er pyntað við holmynstri millum puntarnar.

Á síðu 56 stendur uppskriftin »Jóhanna«. Henda uppskrift er kallað eftir Jóhonnu Jensen, Tórshavn, ættað úr Elduvík. Jóhanna seldi Heimavirkinum hetta turriklæðið í 1970. Elsa Bærentsen hevur gjørt uppskriftina.

Á síðu 70 stendur uppskriftin »Marianna«. Hetta er ikki gomul uppskrift. Elsa hevur gjørt uppskriftina eftir turriklæði, sum Marianna Joensen, f. Danielsen, í Kvívík hevur selt Heimavirkinum, og sum turriklæðið hevur navn eftir.

Á síðu 74 stendur uppskriftin »Elspa Katrina«. Henda einfalda uppskrift er gjørd eftir bundnaturriklæðnum hjá Elspu Katrinu Thomsen í Blásastovu í Norðragøtu, f. 21/12 1858, d. 7/1 1951. Gøtu Fornminnisfelag eigur turriklæðið, sum liggur á goymslu har.

Á síðu 76 stendur uppskriftin »Anna«. Hesa uppskrift hevur Elsa gjørt eftir turriklæði, sum Anna Madsen, f. Petersen, Kvívík, f. 1914, hevur selt Heimavirkinum. Hetta er ikki gamalt mynstur.

Allar hinar uppskriftirnar í bókini hevur Elsa Bærentsen funnið uppá og gjørt.

Á síðu 24 stendur bundnaturriklæðið »Katrin« sum er kallað eftir bróðurdótrini Katrin Jensen, Kvívík, g. Jacobsen, Tórshavn.

Á síðu 34 stendur uppskriftin »Ata« kallað eftir dótrini Atu Bærentsen.

Á síðu 44 er uppskriftin »Birita« kallað eftir bróðurdótrini Biritu Jensen, Kvívík, g. Weihe, Tórshavn. Hetta sera vakra mynstur gjørdi Elsa í 1969 til bundnaturriklæðið, sum Heimavirkið gav drottning Ingrid, tá ið kongshjúnini vitjaðu í Føroyum í 1969. Holini í hesum mynstrinum eru gjørd við fyrimynd í raðfylgjuni í donsku og svensku kongsættunum. Tíverri hevur hon ikki skrivað nakað upp um hetta.

Á síðu 48 er uppskriftin »Ingili«. Henda uppskrift er kallað eftir staðarnavni við Leynavatn »Ingilihús«, har fólk uttan iva hevur búð.

Á síðu 59 er turriklæðið »Magnhild« kallað eftir formanninum í Heimavirkinum Magnhild Olsen, Tórshavn.

Á síðu 62 er turriklæðið »Turið« kallað eftir ommudótrini Turið Anju Abrahamsen, Strendur, g. Haagesen.

Á síðu 66 er turriklæðið »Eyðgerð« kallað eftir systrini Eyðgerð Jensen, Kvívík, g. Bærentsen á Hellu í Kvívík. Hetta er eitt stórt bundnaturriklæði, Elsa hevur ætlað at hava um nýføðing, tá ið hann verður borðin til dópin. Elsa segði, at stjørnurnar í mynstrinum eru til at lýsa fyri barninum, og renningin fyri at barnið skuldi fara at verða kvikt.

Á síðu 80 er turriklæðið »Annika« kallað eftir dótrini Anniku Bærentsen, g. Olsen, Tórshavn. Her ganga stjørnurnar aftur, eins og stjørnur og renning í bundnaturriklæðnum »Ata«. Elsa hevur sagt, at hugskotið til frynsarnar í turriklæðnum »Annika«, fekk hon av turriklæði, sum Marsanna Hansen, fø. Poulsen í Útiguttastovu í Syðrugøtu hevði bundið. Marsanna giftist til Norðragøtu. Hon var 5. 1881 og d. 1971.

Á síðu 84 er turriklæðið »Elin« kallað eftir systirdótrini Elin Bærentsen á Hellu í Kvívík. Mynstrið er »Sólkrossurin«.

Elsa Bærentsen og aðrar kvinnur hava bundið allar uppskriftirnar, ið standa í bókini. Bundnaturrikløðini liggja øll á goymslu hjá Føroyskt Heimavirki.



*Bundnaturriklæði og uppskriftir til hesi hava leingi verið sera væl umtókt*

## Nýggj grannskoðaranevnd

**grannskoðan**
*Tíðindaskriv frá FSG*

Tann 8. desember hevði Felagið fyri Skrásettar grannskoðarar (FSG) aðalfund.

Í nevndina vóru valdir Óli Regin Hansen, Alvi Nielsen og Hermund Jacobsen. Nevndin skipaði seg við Óla Regin Hansen sum formanni, Alva Nielsen sum kassameistara og Hermund Jacobsen sum skrivara.

Nýggja nevndin ætlar at fáa felagið meiri virkið. Ætlanin er eittnú at skipa fyri sokallaðum »tema-kvøldum« har ætlanin er at viðgera ymisk mál, sum eru viðkomandi í grannskoð-anarhøpi.

Higartil hevur bert verið møguligt hjá skrásettum grannskoðarum at verið limur í felagnum, men nú er ætlanin at víðka limaskaran til eisini at fevna um starvsfólk hjá grannskoðaravirkjum, hóast hesi ikki bera heitið Skrásettur grannskoðari.

Í næstum verður skriv sent til limirnar og ymsu grannskoðanarvirkini, har greitt verður frá limatekning, limagjaldi vm.